# Tríggir í salinum

## Loysa beinanvegin



**Rógvi Dam av Norðskála** er ikki í iva um, at hann fer at velja Tjóðveldið týsdagin.

- Eg hevði ikki funnið uppá at valt Sambandið, tí teir vilja føra okkum beint inn í ES. Hetta má ikki henda. Tí mugu vit hava loysing beinanvegin.

Hóast Edmund dugdi væl at tosa, so broytti tað einki støðutakan hansara.

- Eg var ein ein sannførdur tjóðveldismaður áðrenn fundin. Og eri tað framvegis í allar hægsta grad eftir henda fundin, sigur Rógvi.

## Varðveita sambandið



**Sigvard Hansen, Kollafjørður** hevur valt Sambandið alt tað, sum hann kann minnast. Og tað ger hann so sanniliga eisini týsdagin.

- Sambandið er einasta alternativið til ríkisfelagsskapin og umboðanina á fólkatingi. Tobbi hevur so ikki fingið meg til at broyta hugsan.

Sigvard lurtaði við áhuga eftir báðum røðarunum, og hann gav teimum eisini sítt ummæli:

Í einum skala uppá 10 fekk Edmund 8 stig og Tobbi 6.

- Tað var meiri skil í tí, sum Edmund segði.

## Altíð valt tjóðveldið



**Hans Høghamar av Eiði** er ein ektaður tjóðveldismaður og hevur valt tjóðveldið líka síðani 1948. Og tað ætlar hann sær at halda fram við.

- Eg velji tjóðveldið, tí eg vil sleppa at eiga hetta landið. Tað skal ikki forerast vekk til nakran.

Hans er sannførdur um, at tjóðveldið fær ikki bara annað umboðið, men bæði tvey!

- Vit hava lagt leiðina móti sjálvstýrið, og hetta er einasta gongda leiðin, við tjóðveldisflokkinum á odda.

# - Sambandsmenn



*Velja tit okkum báðar, so fær Eysturoyggin betri umboðan, tá eykamenn okkara koma á ting, segði Edmund Joensen*



*Áhoyrararnir stuttleikaðu sær ófört, tá tann siðiligi Edmund og tann orðasnildi Tobbi dystaðust*

**Tað er langur vegur úr New York og til Felagsskúlan á Oyrarbakka. Men tá talan er um ein politiskan valfund eitt illveðurskent hóskvøld, har bert tvey valevni vóru til staðar, var munurin kanska ikki sooo stórur**

VALFUNDUR
*Snorri Brend, snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*

Teir stóðu har frammi, valevnini Edmund og Tobbi, umboðandi hvør sín flokk. Ein pallur var settur upp, teir stóðu við hvør sítt borð, har eyðkennisbókstavar teirra vóru festir frammanfyri. Báðir vóru ílætnir slips, og gjørdu alt fyri at hyggja út yvir áhoyrarafjøldina.

Í høgru síðu í høllini sat orðstýrarin, sum hevði eina rímiliga lætta uppgávu hetta kvøldið: Báðir høvuðspersónarnir vóru virðiligur og haraftrat væl skornir fyri tungubandið, so ikki var neyðugt at bróta teir av í tjakinum.

Áhoyraraskarin kundi verið størri hetta illveðurskenda hóskvøldið. Men hesi, kvinnur og menn í øllum aldrum, frá 13 árum og nakað væl upp í 70'ini, fingu eitt lívligt orðaskifti, har søgur, fakta, viðmerkingar og politiskt orðavavstur fuku gjøgnum luftina.

Eingin teirra veit enn, um hann verður valdur á fólkating. Men sum Edmund so beinrakið segði tað:

- Fyri okkum eysturoyingar er tað rættast og best at velja okkum báðar. Gera tit tað, so fær oyggin tveir eykamenn inn á Ting, og soleiðis fáa tit størri ávirkan bæði á løgtingi og fólkatingi!

Fundurin vardi í tríggjar tímar, og spurningurin er so, um hann flutti veljarar nakran vegin. Tað er nokk lítið sum bendir á tað, um skal trúgva teimum trimum monnunum, sum siga sína hugsan um hetta á hesari síðuni.

### Balsameraðir sambandsmenn

Bæði Edmund og Tobbi vóru samdir um, at danir vita ov lítið um Føroyar. Edmund helt tí, at tað lá ein stór uppgáva hjá øllum føroyingum at kunna um okkara viðurskifti í Danmark.

- Her kann bæði vera talan um politikkarar, felagsskapir, pensjonistafeløg, - ja, í roynd og veru kunnu øll gera tað. Verður kunnað um Føroyar á rættan hátt, so koma teir at skilja okkum og okkara serstøku viðurskifti enn betri.

Hann bleiv her avbrotin av Tobba, sum segði, at skuldi ein lata pensjonistarnar kunna um Føroyar, so hóskaði tað sera væl til ta útdoyggjandi rasuna av sambandsmonnum.

- Tað er so fáir sambandsmenn eftir, at vit mugu skjótt til at balsamera teir, soleiðis at komandi ættarlið fáa at síggja, hvussu teir í veruleikanum sóu út!, segði Tobbi.

Hann helt hinvegin, at tað

# Tobbi var stuttligur

**- Hann dugir sera væl at tosa, sigur ein ung genta, sum enn ikki hevur valrætt**

VALFUNDUR
*Snorri Brend*

Millum áhoyrararnir til fundin var tann bert 13 ára gamla Fríða við Streym av Norðskála.

Hóast tað enn resta fimm ár til hon fær valrætt, so hevur hon longu nógva vitan um føroyskan politikk.

- Vit tosa nógv um politikk heima hjá okkum. Men eg kundi ikki sjálv hugsað mær at verðið politikkarari.

- Tað er bara ikki eg!, sigur Fríða.

### - Ikki eg!

Fríða hevur hoyrt tey har heima tosa nógv um Tobba, men sjálv hevur hon ongatíð sæð hann.

Nú foreldrini fóru á henda politiska fundin á Oyrarbakka, fór hon bara við.

- Eg havi altíð hoyrt, at Tobbi var so stuttligur. Tí vildi eg fara við fyri at lurta eftir honum.

- Og hon var veruliga stuttligur. Hann dugir fantastiska væl at tosa, sigur Fríða.

Hon sat við áhuga og lurtaði eftir framløgunum hjá teimum báðum. Og hon helt, at tað hevði verið ein góður fundur.

- Báðir dugdu væl at tosa. Men eg haldi tó, at Tobbi hevði munin!



*Fríða hevur áhuga fyri politikki, men kundi ikki sjálv hugsað sær at verðið ein!*